*Røða sum Jean Djurhuus helt í sambandi við, at bandasavnið læt upp 2.5.2018, kl. 15.00.*

Góðu áhoyrarar

Eg vil hervið takka fyri høvið at siga nøkur orð um abba mín, Albert Djurhuus (Albert á Høggeil), í sambandi við, at Føroyamálsdeildin (Setrið) letur upp Talgild Søvn við tilfari, sum millum annað Albert hevur verið við at savnað saman. Talan er bæði um kvæðir, vísir, frásagnir, og so staðarnøvn í sunnaru helvt av Suðuroynni.

Talgildu søvnini eru ein stór viðurkenning fyri tað megnar arbeiðið, persónar sum Albert Djurhuus hava verið við til at savna saman gjøgnum áratíggir.

Tað er sera trupult at lýsa Albert upp á 5-6 min. Men eg skal royna at geva eitt stutt íkast her.

Albert varð føddur í Sumba í 1912.

Vaks upp á Høggeil í Sumba.

Eitt heim sum var eyðkent fyri at eiga lutfalsliga nógvar bøkur.

Pápi Albert, Johan Djurhuus (ofta kallaður Johan í Botni), las nógv, hevði skaldagávur (yrkti), og brúkti teirra sparsomu pengar, til at bíleggja bókmentir úti úr heimi. Ein fiól bleiv eisini bíløgd einaferð úr Paris.

Johan var nógv burturi – arbeiddi í El-verkinum í Botni (1921-1949) – men tá ið hann kom til Sumbiar, hevði hann altíð onkran sang við, sum hann hevði yrkt. Og á Høggeil samlaðust so nógv fólk (yngri sum eldri) um kvøldarnar, at tey, sum ikki rúmtist á bonkum og borðum, tey sótu á gólvinum og lurtaðu eftir, tá Johan sang sínar sangir, ella segði frá ymiskum, sum hann hevði lisið ella hoyrt.

Í familjuni á Høggeil varð ein serligur dentur lagdur á at greiða frá søgum, søguligum hendingum, samfelagsviðurskiftum, og at virða læruna frá sínum forfedrum. Her lærdi Albert frá barnsbeini av um frásagnarkynstur, og lærdi bæði føroyasøgu og heimssøgu, eins og gudfrøði.

Albert var timburmaður, sera góður bjargamaður, og starvaðist sum vitapassari í Akrabergi í nærum 40 ár.

Albert var av stuttligastu monnum í vertskapi, og altíð fróður at greiða frá ymiskum, sum hann hevði hoyrt, lisið um, ella sjálvur upplivað.

Eitt ríkt menniskja, sum livdi við í øllum samfelagnum, mitt í einsemi sínum í Akrabergi.

Kvæðini vóru lærd av mannamunni, og altíð var tað frásagnin (søgan) í hendingini, sum lá undir kynstrinum at læra stór kvæðir, uttan skrivligar dokumentatiónir.

Albert dugdi nógv 100-tals kvæðir og vísir. Og hann var sera áhugaður í, hvussu kvæðir blivu framborðin og hvørji kvæðaløg blivu brúkt.

Albert útvegaði sær tíðliga upptøkutól (spola-bandupptakara), og hann syrgdi fyri at fáa gjørt upptøkur av vísum og kvæðum, soleiðis at eftirkomarar og onnur kundu fáa ágóðan av hesum. Nógvar vísir hevur hann sjálvur sungið/kvøðið inn, saman við beiggjum sínum, og finst nógv av tí tilfari á Setrinum í dag. Um hann visti um fleiri ymisk løg til somu vísu, so syrgdi hann fyri, at tað bleiv sungið inn á band og goymt.

Albert og Mortan Nolsøe hittust tíðliga í 60´unum. Tað fekk stóra ávirkan á savnsarbeiðið.

Tá bleiv loftið í húsinum í Akrabergi fylgt upp við ymiskum luftfotomyndum av støðum í Suðuroy, m.a. Beinisvørði. Og Albert fór miðvíst í gongd við at fáa skrivað nøvnini niður á øllum teimum staðarnøvnum, hann kendi. Hann spurdi seg eisini fyri hjá øðrum, bæði yngri sum eldri. Men hann “gitti” ongantíð. Tað var langt undir hansara stoltleika.

Minnist hvussu vit sum børn vitjaðu í Akrabergi, og har vóru altíð fleiri ymisk støð, har vit máttu vera varðin. Tí antin hingu myndir (luftfoto) uppi, fyltar við knappanálum við (staðar)nøvnum á, ella stóðu mikrofonir og bandupptakarar frammi, soleiðis at hann altíð hevði møguleika at skjalfesta nýggja vitan. Eitt sera áhugavert heim.

Albert var ikki akademikari – av útbúgving. Men hann arbeiddi sera skipað og miðvíst, og altíð við góðskuni í hásæti. Tað, sum hann lat frá sær, skuldi eingin seta “fingurin” á.

Talgildu søvnini geva nú okkum øllum lut í pørtum av hesum arbeiði hansara.

Sonur Albert (pápi mín), Johannes Djurhuus, minnist aftur á barnaárini, har sera nógv bleiv kvøðið – í Akrabergi og í Sumba. Men ongantíð sá hann Albert sita og “terpa” kvæðir ella vísir, við at lesa hesi. Hann hevði eitt sjáldsama gott minni. Og var vanur við at tílíkt oftast skuldi lærast av mannamunni.

Albert var sjálvur ein sera góður skipari av kvæðum. Og hann gekk nógv uppí, at føroyskur dansur, kvæðir og vísur altíð skuldu framførast á ein hábærsligan hátt. Albert var altíð maður fyri at “góðsku-tryggja” framførðsluna – og vildi ongantíð taka til takkar við einum miðal-avriki.

Dansitrin, rútma, kropsholdningur, kvæðaframførsla við skipara og niðurlagi. Alt skuldi gerast á besta hátt, og sum forfedrarnir høvdu lært frá sær.

Albert undirvísti tey seinnu árini í dansispølum í kvøldskúlanum í Vági. Hann uppteknaði dansitrinini til nógv ymisk (næstan gloymd) dansispøl, fyri at tryggja, at tey ikki fóru í gloymskuna. Og um kvøldarnar fingu so suðuroyingar høvi at læra hesi dansispøl. Tað eydnaðist eisini, at fáa tikið fleiri dansispøl upp á videoupptøkur.

Eg kann ikki koma til hugs, at vit nakrantíð hava tosað um Albert sum verandi á “ellisárum”. Hann bleiv ongantíð gamal í sinninum, og lýsti upp av orku og blíðsemi, allastaðni har hann var.

Eg vil vegna familjuna takka fyri, at Setrið hevur gjørt tað møguligt hjá almenninginum at seta seg inn í ta mongd av tilfari, sum millum annað Albert Djurhuus av sínum eintingum hevur savnað saman gjøgnum fleiri áratíggir, skjalfest á upptøkum, og sum skrivligt tilfar.

Vónandi fer hetta at varðveita og helst økja áhugan fyri kvæða- og vísumentanini í Føroyum.

Albert andaðist í 1999, 87 ára gamal.

Á hansara gravsteini stendur “Minnini liva”.

Takk fyri.